**Pangea støddfrøðikappingin**
**27. apríl í 2024**

# Finala – 7. flokkur

## *Svarini verða skrivað á svarblaðið aftast*

**Uppgáva 1**

Palleba keypir sjey perur og tíggju súrepli fyri 6,20 €. Marsanna keypir fimm perur og fimm súrepli fyri 4,30 €.
Hvat kostar ein pera?

**Uppgáva 2**

Í talinum $N = 111\ldots11$ eru 100 siffur, og 11 gongur upp í talið. $N$ verður nú býtt við 11. Úrslitið av hesum býtistykkinum er talið $M$. Hvussu ofta kemur sifrið 0 fyri í $M$?

**Uppgáva 3**

Fimm posar viga til samans 200 kg. Posarnir verða nú vigaðir tveir og tveir, so allar møguligar samansetingar eru við. Tær tíggju vektirnar, sum tá koma fram, eru 70 kg, 71 kg, 73 kg, 76 kg, 80 kg, 81 kg, 85 kg, 86 kg, 91 kg og $x$ kg. Finn $x$.

**Uppgáva 4**

Anna og Beinta fylgjast inn í eina pitsubúð. Anna ætlar at keypa eina *lítla* pitsu nevnd Quattro Formaggi, men hon eigur ikki fyri hana. Har resta 2 € í. Beinta ætlar at keypa somu pitsu, men har er sama skilið. Hjá henni resta 3 € í. Tí leggja tær pengarnar saman og keypa í staðin í felag eina Quattro Formaggi í *miðalstødd*, sum kostar 1 € meiri enn tann *lítla* Quattro Formaggi. Nú ber til, og tær hava 5 € í avlopi.
Hvat kostar tann *lítla* pitsan Quattro Formaggi?

**Uppgáva 5**

Givið er, at

- $A$ er $\dfrac{6}{5}$ av 90,
- 90 er $\dfrac{3}{5}$ av $B$,
- 66 er $\dfrac{C}{100}$ av 50.

Finn $A$, $B$ og $C$.

**Uppgáva 6**

Við bókstavunum $E$, $P$, $R$, $S$ og $U$ kunnu verða gjørd 120 ymisk orð, har hvør stavur bara kemur fyri eina ferð. Ímillum orðini eru eisini høpisleys orð. Øll hesi 120 orðini verða nú skipað í bókstavarað. Á hvørjum plássi kemur orðið $SUPER$ at standa?

**Uppgáva 7**

$ABC$ er tríkanturin við hornunum $A$, $B$ og $C$. Hetta er galdandi fyri tríkantarnar:

- Arealið á $ABC$ = $16 \cdot$ arealið á $GHC$.
- Arealið á $GEF$ = $9 \cdot$ arealið $GHC$.
- Arealið á $DHI$ = $4 \cdot$ arealið $GHC$.
- Arealið á øllum skapinum á myndini er 81 cm$^2$.

Hvat er arealið á tríkantinum $GHC$?



Svarblað: Finala - 7. flokkur 27.04.2024

Navn: ______________________________

**Uppgáva 1**

**Uppgáva 2**

**Uppgáva 3**

**Uppgáva 4**

**Uppgáva 5**

**Uppgáva 6**

**Uppgáva 7**